## Hotell lata aftur

Higartil í ár eru meiri enn 300 hotell í amerikanska statinum Kalifornia farin í gjaldssteðg, og tað er fimm ferðir fleiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Um orsøkina verður sagt, at hotellini hava ikki megnað at halda sínar fíggjarligu skyldur, samstundis sum tey hava havt munandi færri gestir orsakað av fíggjarkreppuni. Blaðið Los Angeles Times skrivar, at kappingin millum tey hotellini, sum enn eru opin, er beinhørð, og serfrøðingar siga við blaðið, at fleiri hotell afturat fara at lata aftur innan árslok.



## Fjórði hvør muslimur

Ein milliard og 570 milliónir fólk hava islam sum trúgv, og sostatt er næstan fjórða hvørt fólk í heiminum muslimur. Tað er úrslitið av einari kanning, sum umfatar ikki færri enn 232 lond og økir kring allan heimin. Har sæst at 20 prosent av heimsins muslimum búgva í Miðeystri og Norðurafrika, meðan heili 62 prosent búgva í Asia. 15,3 prosent búgva í Afrika sunnan fyri Sahara, 2,4 prosent eru í Evropa, og tey seinastu 0,3 prosentini búgva í Norður- og Latínamerika. Indonesia, Pakistan og India eru tey londini, sum hava flest muslimar.

# Flogvøllurin byggjast út við størsta varsemi

**John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, mælir til størsta varsemi, áðrenn flovøllurin í Vágum verður bygdur út og hann sigur, at nógvir løgtingslimir hava somu støðu**

FLOGVØLLURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hava vit fyrst brúkt eina hálva milliard upp á at byggja flogvøllin í Vágum út, kunnu vit gloyma alt um ein annan, longri vøll í Føroyum tey næstu 40 árini, staðfestir John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum*

- Vit mugu vísa størsta varsemi, áðrenn vit brúka eina hálva milliard til at byggja flogvøllin í Vágum út fyri.

Tað staðfestir John Johannessen, politiskur formaður Javnaðarfloksins.

Hann sigur, at í fleiri ár hava vit roynt at fáa greiði á, hvar tað best hóskandi staðið er at leggja ein framtíðartryggjaðan føroyskan flogvøll.

Men hann staðfestir samstundis, at verður fyrst ein hálv milliard skotin av á flogvøllinum í Vágum, ganga minst 40 ár áðrenn tað kemur upp á tal at gera ein ordiliga langan, framtíðar vøll nakrastaðni í landinum, skuldu kanningar víst, at Vágar kortini ikki er tað best hóskandi staðið at leggja okkara framtíðar flogvøll.

Tí heldur hann, at tað er alneyðugt, at politiski myndugleikin ger sær púra greitt, hvat hann gevur seg í kast við, áðrenn nøkur endalig avgerð um at byggja vøllin í Vágum út.

### Nógvir spurningar

Hann heldur, at tað kanska er neyðugt at longja vøllin í Vágum.

- Men spurningurin er um tað skal vera 1600, 1700 ella 1800 metrar.

- Spurningurin er eisini, hvussu nógv skal gerast við farstøðina við vøllin.

Sjálvur heldur hann ikki, at tað er rætt at taka alt ov rívan til í Vágum, fyrrenn ein nágreinilig faklig meting vísir, at tað er rætta staðið at leggja ein framtíðar flogvøll.

Tað metingina saknar hann, tí áðrenn hon er komin, ber ikki til at taka eina endaliga støðu um Vágar.

- Líka mikið, hvat vit gera vesturi í Vágum, sleppa vit ikki undan Sørvágsfirði og tí herviliga turbulensi, har kann vera sigur hann.

Og líka mikið, hvat vit gera vesturi í Vágum, sleppur flogfarið heldur ikki undan at skula snara stutt frá vøllinum undir lending og tí ber ikki til at brúka nútímans innflúgvingartól vesturi í Vágum, leggur hann afturat.

### Fleiri eru samdir

Og hann staðfestir, at hann er langt frá einsamallur um hesa áskoðan.

- Eg veit at tað runt um í krókunum í Løgtinginum, eru fleiri politikarar, sum tosa um tað sama og sum hava somu meining sum eg.

John Johannessen vil sostatt hava eina fakliga nágreining av, hvar tað er best at leggja ein flogvøll.

- Og so skal okkara framtíðar vøllur verða har, um tað so er í Vágum, á Glyvursnesi ella aðrastaðni, sigur hann.

# Besta slakt teir vita um

**Trygvi Thomsen og tey í Sumba hava mangan havt gott slakt, men so gott sum í ár vita teir ikki um**

SLAKT

*Áki Berttholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Flesta staðni kring landið verður sagt, at slaktið í ár er betri enn miðal.

Hjá Trygva Thomsen og teimum í Sumba er slaktið í ár ikki bara betri enn miðal. Tað er so gott í ár, sum teir ikki vita um áður.

Síðsta leygardag drap Sólfinn Kjærbo, sum eisini hoyrir til húsið, seks veðrar.



*Tað eru nøkur eiggilig krov, ið Trygvi Thomsen og teir hava hangandi í hjallinum. Miðalvektin á teimum fimm veðrunum var 91,8 pund og so javnt gott slakt vita teir ikki um har hjá teimum. Legg eisini til merkis fótamøðrarnar, ið hanga útspentar á hjalsvegginum aftanfyri Trygva. Tær verða døgverðamatur 1. sunnudag í advent*

Av teimum vóru fimm veturgamlir og ein var tvævetur.

Teir veturgomlu vigaðu heili 91,8 pund í miðal og tað er óhoyrt hjá teimum.

Veðrarnir vigaðu úr 84 pundum upp í 100 pund.

Tann tvæveturgamli vigaði 104 pund og harafturat drupu teir ein veðr úr Hólminum og hann vigaði 72 pund.

So tað eru nøkur eiggilig krov í hanga í hjallinum við Kvíggjaveg í Sumba.

- Hetta er tað besta slaktið, vit vita um og tað mann vera ógvuliga sjáldsamt um okkara leiðir, at slaktið hevur verið so javnt gott, sigur hann.

### Sera góð lomb

Trygvi Thomsen sigur, at tað vóru serstakliga stór lomb, teir síðsta heyst settu við at hava til veðr.

Lombini vóru øll av føroyskum seyðaslag og hann sigur, at tey høvdu tað gott inni síðsta vetur og tey hava verið spøk.

- Tey hava staðið gott og tað er gjørt væl við tey. Í vár vóru allir veðrarnir sleptir á somu trøð og har hava teir eisini fingið afturat.

Annars sigur hann, at tað hevur verið sera góður grøður í ár og tað hevur sjálvandi eisini gjørt sítt.

Hann leggur afturat, at trøðin, veðrarnir hava gingið á, er gott lendi og teir plaga at fáa góðan seyð av henni, men ongantíð hevur slaktið verið so gott sum í ár.

### Turka fótmøðrar

Fyrr var tað nógvastaðni siður at hava turkaða fótamøðr til døgverða 1. sunnudag í advent.

Hendan siðin halda Trygvi Thomsen og tey fast um enn og lesarin sær, at á hjalsvegginum aftanfyri Trygva, eru fótamøðrar spentar út og hongdar upp at turka.

1. sunnudag í advent verða tær koyrdar í ovnin at steikja eina løtu og so verða tær etnar til døgverða við eplum aftur við.